Dagf. 8. februar 2021
HMR J. nr. 21/00830-7

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

fyrispurning nr. 52-076/2020 eftir § 52a í tingskipanini um biologiskt tilfar í sambandi við koronukanningar frá Ruth Vang, løgtingskvinnu

Spurningurin var soljóðandi:

1. Nær verður biologiska tilfarið burturbeint, sum verður tikið frá persónum í sambandi við kanningar av koronusmittu, sum verða bílagdar á korona.fo?
2. Verður tilfarið brúkt til annað enn at staðfesta, hvørt kannaði persónurin hevur koronusmittu?
3. Hevur landsstýrismaðurin avtalað mannagongdir við viðkomandi kanningarstovur í hesum sambandi?

Svar:

Til spurning 1
Í spurningunum vísur spyrjarin til "...kanningar av koronusmittu, sum verða bílagdar á korona.fo". Umframt kanningar, sum verða bílagdar í corona.fo, verða sum kunnugt eisini kanningar gjørdar av øllum, sum koma til Føroya.

Sjúkrahúsverkið hevur ábyrgd av kanningunum, sum verða bílagdar á corona.fo og tryggjar, at alt fer rætt fram. Sjúkrahúsverkið hevur avtalu við ávikavist Thetis og Heilsufrøðiligu Starvsstovuna um at greina kanningarnar. Mannagongdin hesum viðvíkjandi og hvussu tilfarið verður burturbeint verður nærri lýst niðanfyri.

Thetis:
Mannagongdin er tann, at allar potanir frá Klaksvíkar Sjúkrahúsi, Suðuroyar Sjúkrahúsi og Landssjúkrahúsinum, sum verða sendar til greiningar hjá Thetis, verða merktar við strikukotu. Sostatt verða persónsupplýsingar ongantíð veittir. Tá greiningin er liðug, verða allar potanir sendar aftur á Rannsóknarstovuna á Landssjúkrahúsinum, sum beinir tær burtur beinanvegin sum vandamikið burturkast saman við øðrum rannsóknarstovuprøvum. Burturkastið hjá

Landssjúkrahúsinum verður koyrt á brennistøðina, har starvsfólk hjá sjúkrahúsinum beina burturkastið beinleiðis í brenniovnin.

Tað finnist ein innanhýsis mannagongd um "Handfaring av burturkasti", sum verður fylgd í hesum sambandi.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan:

Allar potanir frá Klaksvíkar Sjúkrahúsi, Suðuroyar Sjúkrahúsi og Landssjúkrahúsinum, sum verða sendar til greiningar hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni (HFS), verða merktar við strikukotu. Sostatt verða persónsupplýsingar ongantíð veittir. HFS fylgir eini mannagongd við heitinum "Burturkast á kanningarstovunum", sum ásetur, at potipinnar og uppreinsað RNA, har coronavirus ikki er ávíst, verður fryst í gular posar, sum verða heintaðir 2-3 ferðir um vikuna og koyrdir beinleiðis í brunnin á brennistøðini, og har grabbin flytur burturkast í brenniovnin. Tað vil siga, at ongin persónur hevur møguleika at fáa fatur á posunum. Tá posarnir verða heintaðir, skal starvsfólk frá Renovatiónini skriva undir eitt innanhýsis skjal hjá HSF, so tryggjað er, hvør hevur heintað posarnar.

Umframt tær kanningar, sum Sjúkrahúsverkið hevur ábyrgdina av, so hevur Heilsumálaráðið gjørt avtalu við ávikavist Thetis og Smyril Line, tá ið tað viðvíkur at kanna øll ferðafólk, sum koma til Føroya.

Í avtaluni við Thetis framgongur, at tað er Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu, sum hevur ábyrgdina av at gera kanningar av øllum ferðafólkum, sum koma loftvegis til Føroyar. Yvirlæknin á deildini, Pál Weihe, hevur tí upplært og góðkent fólk at gera hálspotingar av øllum teimum, sum koma til flogvøllin í Vágum. Hann hevur eisini góðkent kanningarstovuna Thetis at gera PCR greiningar av potitilfarinum. Allir potipinnarnir verða beinanvegin sendir beinleiðis av flogvøllinum suður á kanningarstovuna til greiningar. Alt tilfar frá fólkum, har COVID-19 ikki verður ávíst, verður beinanvegin burturbeint. Potipinnar hjá teimum, sum verða staðfest positiv fyri COVID-19, verða goymdir í eina viku. Hetta tí, at tað kann koma uppá tal at kanna fyri mutatiónir, t.d. at staðfesta, um talan er um serliga smittandi bretska frábrigdið (B.1.1.7). Tilfarið verður goymt í læstum rúmi á starvstovuni Thetis. Tey, sum arbeiða á koronastarvsstovuni, hava atgongd til hesar pinnar, men hava ikki loyvi til at brúka teir til nakað annað enn til víðari greining sambært boðum frá Pál Weihe, sum hevur ábyrgdina mótvegis teimum einstaklingum, sum hava latið seg kannað.

Í avtaluni við Smyril Line framgongur, at talan skal verða um kanningarstovu, sum ger kanningarnar eftir delegatión av lækna.

Smyril Line skal harumframt tryggja sær, at kanningarstovan, ið ger korona-kanningarnar, einans hevur pseudonymiseraðar persónupplýsingar um hendi, og sostatt m.a. ikki kann knýta kanningarúrslit beinleiðis til ávíst ferðafólk.

Um ferðafólk, sum koma við Norrønu, verða testað negativ fyri koronu, tryggjar Smyril Line, at kanningarnar verða burturbeindar.

Um eitt ella fleiri ferðafólk verða testað positiv fyri koronu, tryggjar Smyril Line, at Landslæknin í Føroyum fær boð beinanvegin bæði telefoniskt og skriftligt. Síðani tryggjar Smyril Line, at kanningarnar verða burturbeindar.

Til spurning 2
Nei. Tilfarið verður einans brúkt til at kanna, um ein persónur er smittaður við koronu-virus og at kanna, hvat slag av virus talan er um.

Til spurning 3
Sí svarið til spurning 1.

Heilsumálaráðið, 8. februar 2021

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður